# PRÍSSKRÁ

SEV

GALDANDI FRÁ 1. JANUAR 1991

Prísurin pr. kWh er íroknaður orkugjald smbr. løgtingslóg nr. 99 1986

| *Ársnýtsla:* | *Fast gjald:* | *Prísur pr. kWh:* |
|---|---|---|
| 0 — 10.000 kWh | kr./ár 504,00 | 1,39 kr./kWh |
| 10.000 — 100.000 kWh | kr./ár 1.500,00 | 1,29 kr./kWh |
| yvir 100.000 kWh | kr./ár 5.496,00 | 1,25 kr./kWh |

Nýtarar við ársnýtslu størri enn 5 mill. kWh kunnu fáa serliga gjaldsskipan.

Undantikið tá streymveitingin er slitin vegna brek á innleggingina, eftirstøðu ella av aðrari orsøk, har málarin ikki verður niðurtikin, verður fasta gjaldið bert kravt fyri tíðina, innleggingin er íbundin hjá S.E.V.

Innleggingar ið ikki verða nýttar, men enn ikki uppsagdar, skulu gjalda fast gjald, sum eigarin ber ábyrgd av.

## YMISK GJØLD

Tá ið gjaldsáminning verður send, má gjaldast kr. 10,00 fyri hvørja áminning.

Tá neyðugt er at slíta streymveitingina vegna tørvandi gjald, verða kr. 300,00 lagdar afturat rokningini.

Renta fyri skuld er 1,5 % pr. mánað.

Málarin kann verða kannaður, tá tað verður ynskt.

Um málarin er í lagi, verða kr. 200,00 kravdar í ómaksgjaldi.

## FLYTAN

Tá flutt verður, skal málarin lesast av, og avlesturin boðast frá til S.E.V.

Tann sum flytir, hevur skyldu at gjalda, til málarin er avlisin.

## FYRIBILS STREYMVEITING

Tá fyribils streymveiting verður veitt til byggipláss, stuttleikaøki o. a., eru hesir prísir galdandi.

| | |
|---|---|
| Fast gjald: | kr. 108,00 pr. byrjaðan mánað. |
| Elorkugjald: | 10 % afturat vanligu prísskránni. |
| Depositum: | kann verða kravt. |

Málarin verður settur upp av S.E.V. Málarin má ikki flytast til annað streymveitingarstað.

Allar útreiðslur í sambandi við fyribils streymveiting so sum styrkjan av neti ella víðkan, verður goldið eftir rokning frammanundan.

## VANLIG ÍBINDING

Tá biðið verður um arbeiðsstreym eru hesir prísir galdandi:

| | |
|---|---|
| Fast gjald: | Eftir vanligu prísskránni. |
| Elorkugjald: | 10 % afturat prísinum eftir vanligu prísskránni. |

Tá ein innlegging verður endaliga fráboðað, verður prísskráin broytt til ta vanligu, treytað av at:

1. Liðugfráboðan er fingin frá góðk. el-innleggjara og viðgjørd av S.E.V.
2. Møgulig brek á innleggingini eru rættað.

Nýtarin skal gera teymin millum veitingarstað og innleggingina. Um teymurin verður longri enn 50 m, letur S.E.V. ískoyti pr. m fyri kaðal og grøv. Ískoytið verður givið fyri tað talið av metrum, sum teymurin er longri enn 50 m. Gjaldið er ásett av S.E.V. og verður goldið nýtaranum, tá hann vendir sær til S.E.V. við avriti av rokningini frá el-innleggjara.

Tá nýtarin skiftir luftteym út til kaðalteym við sama tvørmáti, letur S.E.V. somuleiðis ískoyti til kaðalkostnaðin.

## ÍBINDINGARGJALDIÐ:

1. Tá bundið verður í elnetið hjá S.E.V., skal vanligt íbindingargjald gjaldast smbr. prísskránni.
2. Verður innlegging broytt soleiðis at teymasikring má gerast størri, skal íbindingargjald latast, sum svarar til munin millum sikringarnar.
3. Um minni teymasikring verður sett í til eina verandi innlegging, verður einki íbindingargjald goldið aftur.
4. Íbindingargjaldið er knýtt at teyminum til eitt ávíst matr. nr., og teymurin kann flytast innan fyri hetta matr. nr., um so er at hetta ikki verður til útreiðslur fyri S.E.V.

   Um nýtari ynskir íbinding aðrastaðni í elveitingina hjá S.E.V., skal nýtt íbindingargjald gjaldast smbr. galdandi prísskrá.

## GJALDSSKRÁ FYRI ÍBINDINGARGJALD:

| | |
|---|---|
| *Sethús, max 35 A:* | 5.000 kr. pr. teym |
| (Er eisini galdandi fyri raðhús; hesi skulu smbr. Felagsregulativinum hava hvør sín teym) | |
| *Neyst:* | |
| Fyrsta neystið | 5.000 kr. |
| Fylgjandi neyst á sama teymi | 2.500 kr. pr. neyst |
| *Íbúðarbygging við felags teymi:* | 2.500 kr. pr. íbúð |
| *Innleggingar uttan málara*; vanl. max 0,1 kW: (t. d. telefonkioskir, ferðsluljós, antennuanlegg, vegteljarar, elhegn) | 0 |
| *Aðrar innleggingar, max 35 A:* (t. d. gøtuljós, pylsuvognar) | 5.000 kr. pr. teym |
| *Víðkan, 2 til 3 fasur* (sama tvørmát): | 0 |
| *Innleggingar størri enn 35 A:* (A    tal av Amp. yvir 35) | 5.000 kr. + (A×200) |
| *Avsíðis liggjandi innl.:* (t. d. fjós, seyðahús, hoyggjhús, summarhús) | Veruligar útreiðslur frádrigið 3 × vanligt íbindingargjald, tó minst áðurnevndu upphæddir. |
| *Vindmyllur:* | Serligar reglur. |
| *Fyribils innleggingar:* Byggipláss, ítriv o. a. | Veruligar útreiðslur. |

*Samtykt á stýrisfundi 7. desember 1990.*


S.E.V.
Staravegur 5
Postrúm 319
FR-110 Tórshavn
Tlf. 11366
Telex 81289
Telefax 10366

S.E.V., Vestmanna
Tlf. 24433

S.E.V., Klaksvík
Tlf. 55002

S.E.V., Vágur
Tlf. 73016


Prent: HNJB · Tlf. 19436